# Ein vika við øllum og fyri øll



*Rannvá Troest hevur havt ábyrgdina av mentanarvikuni. Hon hevur lagt eitt stórt arbeiði í at fáa eina so áhugaverda og fjølbroytta skrá sum tilber*




**Umframt Faroexpo-ráðstevnuna verður Runavíkin eisini karmur um ein hóp av mentanartiltøkum alla ta komandi vikuna**

MENTAN
*Snorri Brend*

**Runavík:** Tað er ikki á hvørjum degi, at runavíkingar og fólk í Eysturoynni fáa høvið at fara bæði til gongutúrar, gallakvøld, framsýningar, konsertir, teysakvøld, framløga av nýggjari bók og cirkus í eina heila viku.

Í so máta verður komandi vikan eitt rættiligt undantak – og eisini ein undangonga í so máta.

Í samband við stóru ráðstevnuna í býnum, verður tann mentanarligi parturin ikki gloymdur.

Frá í dag og heilt fram til komandi vikuskifti verður mentanin sett í hásætið við tiltøkum fyri allar aldursbólkar.

- Hetta er fyrstu ferð vit royna hetta. Men okkara vón er, at hetta kann gerast eitt afturvendandi tiltak har vit kunnu fáa kend nøvn hendavegin, sigur Rannvá Troest, samskipari av mentanarvikuni.

## Klaverstjørna

Mentanarvikan í Runavík byrjar longu í kvøld kl. 19:30, tá sjónleikurin Sellofan verður spældur í Glyvra skúla.

Í morgin verður so sett hol á framsýningarnar, tá bæði Jóannes S. Hansen og Hilmar J. Højgaard lata upp málningaframsýningar í ávikavist býráðssalinum og í gamla handlinum í Saltangará.

Samstundis byrjar heystframsýningin í bygdasavninum Forna, eins og ein framsýning við ymiskum verkum hjá Petslu Skipanes, Eyð Persson og Øssuri Mohr letur upp í Orkis.

Fleiri spennandi konsertir verða eisini í komandi viku. Ein av hesum verður týskvøldið, tá unga danska klaverstjørnan, Ida Kellemann Thomsen fer at hava konsert, eins og ungir lokalir tónleikarar.

Runavíkingar fáa eisini vitjan av Trøllapæturi og ommuni til eitt show, sum verður sagt at vera tað største nakrantíð.

Mentanarvikan endar við eini sangløtu í Glyvra kirkju sunnukvøldið kl. 20.

So her er lagt eitt stórt arbeiði í at gera eina sera fjølbroytta skrá fyri allar aldursbólkar.

Og lítil ivi man vera um, at her eisini er okkurt tiltakið til øll fólk.